# Tingið nýtir ikki síni amboð

*Høgni Hoydal metir trupulleikarnir í stýrisskipanini vera, at tingið er ov veikt. Tað brúkar ikki tey amboð, tað hevur*

John Johannessen

– Løgtingið hevur í stýrisskipanini ymisk amboð, tað kann brúka fyri at fáa gjørt sítt arbeiði til lítar. Eitt av hesum amboðum er møguleikin at leggja misálit á landsstýrismann, hevur hesin ikki røkt sínar skyldur. Men løgtingið brúkar ikki síni amboð.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, er í fleiri førum samdur við sjónarmiðunum hjá partamanni sínum, Tórbirni Jacobsen, tingmanni, í grein í Sosialinum í gjár. Í greinini finnist Tórbjørn Jacobsen á arbeiðsgongdina í tinginum, og skýrir hann løgtingið einans at vera eina avgreiðslustovu hjá landsstýrinum. Tískil metir hanns tingmenn sum atkvøðuneyt hjá teimum átta landsstýrismonnunum.

### Kritikkur móti tinginum

Hóast Høgni Hoydal partvís er samdur við Tórbirni Jacobsen, metir hann ikki, at tað er landsstýrinum, nakað er galið við. Hetta heldur hann eisini, at Tórbjørn Jacobsen sigur í viðtaluni við Sosialin.

– Eg meti atfinningarnar hjá Tórbirni at vera móti tinginum, ið ikki er nóg sterkt at megna sínar uppgávur. Løgtingið hevur í nýggju stýriskipanarlógini somu møguleikar sum onnur parlament í heiminum. Men stýrisskipanin krevur, at tingið styrkir sín leiklut. Tað má brúka síni amboð.

Hesi amboð, landsstýrismaðurin vísir á, eru til dømis at leggja misálit á landsstýrisfólk, ið ikki røkja sínar skyldur, at seta landsstýrisfólkum fyrispurningar og so framvegis.

Høgni Hoydal vísir á, at tingið í seinastu í stóran mun hevur nýtt møguleikan at seta fyrispurningar til landsstýrisfólk, men tá tað kemur til at leggja misálit á landsstýrisfólk, heldur tingið sær aftur.

Hetta, ásannar Høgni Hoydal, hongur saman við, at tingið er bangið fyri samgongusliti, og at tingið ikki fær ætlaða politikk sín ígjøgnum. Men hann heldur veruligu orsøkina vera, at tingið er ov veikt í mun til landsstýrið.

### Útinnandi valdið styrkt

Høgni Hoydal vísir á, at eftir nýggju stýrisskipanini er útinnandi valdið, landsstýrið, styrkt við embætismonnum, meðan tað sama ikki hevur verið galdandi fyri løgtingið. Men hann er vísur í, at tað fer at styrkja floksskrivararnir, játtaðir eru á fíggjarlógini, fara at styrkja um politiska arbeiðið. Somuleiðis heldur hann, at ein umboðsmaður fer at betra um arbeiðið.

Landsstýrismaðurin ger tó heilt greitt, at um tingfólk veruliga eru ónøgd við politisku skipanina, má finnast fram til, hvussu betrast kann um hana.

– Tað ber ikki til bara at finnast at og so ikki gera nakað meira við málið. Eg taki útsagnirnar hjá Tórbirni Jacobsen sum eitt slag av eftirmeting av stýrisskipanini, og haldi eg, at vit eiga at viðgera hetta víðari.

### Misálit størsti trupulleikin

Sambært Høgna Hoydal er størsti politiski trupulleikin í Føroyum misálit á politisku skipanina. Fólk hava ikki álit á politisku skipanini.

Hetta, heldur Høgni Hoydal, hongur saman við, at Føroyar ikki eru sjálvstøðugar.

– Eitt høvuðsemdamálið við at fáa fullveldi er, at vit fáa politisku skipanina at virka sum hon skal. Og hetta megna vit, fáa vit fullveldi. Tí setir tú tær fullveldi sum mál, mást tú fáa hesi tingini í rættlag, annars verður galið.

Spurningurin til Høgna Hoydal í hesum sambandi er, um tað yvirhøvur ber til at fáa fullveldi, um hesi tingini ikki verða fingin í rættlag fyrst.

Høgni Hoydal er samdur, men sigur, at tingini hanga saman. Tingini verða, eftir hansara tykki, fingin í rættlag undir fullveldisgongdini.

Men so er spurningurin, um tingini ikki eisni skulu betrast, um vit ikki fáa fullveldi.

– Jú, sjálvsagt skal politiska skipanin fáast í rættlag, hóast vit ikki fáa fullveldi, men skipanin hongur eisini saman við, hvussu stóra ábyrgd vit hava av landinum, sigur Høgni Hoydal.

### Gott við kunning

Sambært Høgna Hoydal er ymiskt gjørt undir hesari samgonguni, ið betrar mundandi um politiska arbeiðið. Hann vísir á, at løgmaður kunnar samgongutingfólk um lógaruppskot frá landsstýrinum áðrenn tey fara í tingið, so hesi tingfólk hava møguleika at seta seg inn í málini og koma við viðmerkingum og møguligum broytingum áðrenn tingviðgerðina.

Men sambært politiska partamanni hansara, Heina O. Heinesen, formanni Tjóðveldisfloksins, er hetta ikki nakað, sum betrar um politiska arbeiðið. Hann vísti í samrøðu við Sosialin hósdagin á, at hetta beinleiðis stríðir ímóti fólkaræðinum og leggur upp til einaveldi.

Grundgevingarnar hjá Heina O. Heinesen vóru, at hetta hevur við sær, at mál eru hálvgum samtykt millum samgongutingfólk, áðrenn tey koma fyri tingið. Tískil sleppur andstøðan als ikki at hava nakra ávirkan á avgerðirnar í samfelagnum, og hetta er ikki rætt, heldur hann.



*Høgni Hoydal heldur størsta trupulleikan við politisku skipanin vera, at tingið ikki er nóg sterkt og ikki nýtir síni amboð*

Høgni Hoydal er samdur við Heina O. Heinesen í, at politska viðgerðin sjálvsagt skal vera í tinginum, men hann vísir samstundis á, at tað ikki skaðar, at samgongutingfólk eru kunnaði um mál áðrenn tey koma fyri í tinginum. Hetta heldur hann ikki merkir, at tey eru hálvgum samtykt áðrenn tey eru komin í tingið.

– Fleiri lógaruppskot frá mær eru væl og virðiliga viðgjørd og broytt í tinginum áðrenn tey eru samtykt, og tað eri eg glaður fyri, sigur Høgni Hoydal.

Landsstýrismaðurin vísir annars á, at tað ikki er nakað nýtt, at løgtingslimir eru ónøgdir við arbeiðsgongdina. Hann vísir á, at hetta eisini hevur verið galdandi undir øðrum samgongum, serstakliga tá Føroyar komu undir umsiting í 1992.

# MR - skannarin tikin í nýtslu 1. februar

*Tað hevur gingið eftir bókini at sett nýggja MR-skannaran upp á Landssjúkrahúsinum. Í løtuni læra læknar seg at nýta skannaran*

John Johannessen

Í hesum døgum verður nýggi MR-skannarin, Landssjúkrahúsið hevur fingið til gávus frá Tryggingarfelagnum Føroyar, royndarkoyrdur. Tað hevur gingist eftir bókini at sett skannaran upp, og er ætlanin, at hann alment skal takast í nýtslu fyrsta februar.

Anders Harboe Ree, yvirlækni á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum, fegnast um, at skannarin, ið Landssjúkrahúsið fekk til gávus 17. september í 1998, umsíðir kann verða tikin í nýtslu.

Skannarin var ein gáva í sambandi við, at Tryggingarsambandið hendan dagin varð umskipað til partafelag og fekk heitið Tryggingarfelagið Føroyar.

### Drúgv fyrireiking

Hóast Landssjúkrahúsið fekk skannaran sum gávu, hevur tað kostað fitt av pengi at fáa hann inn á røntgendeildina. Talan var nevniliga um eina stóra maskinu, ið skuldi setast upp í einari lítlari deild í einum sjúrkrahúsið við plásstroti. Tí var neyðugt at gera stórar umbyggingar, ið hava tikið drúgva tíð.

MR-skannarin er ein magnetskannari, ið ógvuliga lætt verður órógvaður av megnetfeltum, sum til dømis skipum, ið sigla framvið Landssjúkrahúsinum og bilum, ið koyra omanfyri sjúkrahúsið.

Fyri at sleppa undan órógvanum av slíkum magnetfeltum, hevur verið neyðugt at isolera rúmið, har skannarin stendur á serligan hátt. Hetta hevur eisini tikið tíð somuleiðis, sum tað hevur kostað pening. Men viðmerkjast skal tó, at hetta er gjørt sum liður í ætlaðu umbyggingunum á Landssjúkrahúsinum.

### Yvirlæknin var fyrstur

Læknar og onnur starvsfólk á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum hava seinastu dagarnar lært seg at brúka skannaran við at kanna hvønn annan.

Yvirlæknin á deildini, Anders Harboe Ree, sigur, at hann var tann fyrsti í skannaranum. Hann vísir á, at tað ikki er heilt vanligt at royndarkoyra nýggj tól við starvsfólkum, men tá talan er um ein MR-skannara kann hetta gerast, tí tað er púra vandaleyst.

– Tað eru jú einans radiostrálur, ið koma frá einum MR-skannara, og slíkar verða vit bombarderaði við úr himmalrúminum allan dagin, so tað er als ikki siðsemiliga skeivt av okkum at læra okkum at brúka skannaran við at kanna okkum sjálvi, sigur hann.

Anders Harboe Ree greiðir frá, at var talan um aðra útgerð, sum til dømis røntgen, hevði ikki verið borið til at roynt útgerðina á starvsfólkini uttan loyvi frá siðsemisnevndini.

Eftir fyrsta februar, tá MR-skannarin alment verður tikin í nýtslu, verða tað sjúklingar, ið verða kannaðir í skannaranum.



*Gávan frá Tryggingarfelagnum Føroyar á sjey milliónir krónur – MR-skannarin – er nú sett upp og verður tikin í nýtslu 1. februar*

**Mynd: Jens Kristian Vang**



Viðmerking:

# Hvør eigur svartkjaftin?

Í degi og viku í Sjónvarpi Føroya hóskvøldið 06.01.2000 hevði Bogi Godtfred savnað tilfar um svartkjaftakvotur og vísti á, hvussu tunnbýttar hesar kunnu fara at vera, um endaligt TAC (mest loyvda veiða) verður sett á svartkjaftin.

Bogi hevði eisini ttosað við eitt umboð fyri trolarnar í Barentshavinum, sum skuldi hava sagt, at svartkjafturin hoyrir til henda partin av flotanum, tí at hann í løtuni er tað, sum vit geva russarum í býti fyri toskin har uppi.

Fyri tað fyrsta er at siga, at sambært lógina um vinnuligan fiskiskap er alt okkara tilfeingi fólksins ogn og vit, sum hava skip hava bert ein rætt - eitt loyvi - til at gagnnýta hetta tilfeingi. Av tí sama kann ein kvota heldur ikki veðsetast.

Undanfarnir landsstýrismenn í fiskivinnumálum hava lagt nógvan dent á at fáa menn til at gera íløgur í skip til at fiska svartkjaft m.a. fyri at hava tað besta søguliga grundarlagið, tá ið býtast skuldi og lokkaðu við at lata eitt sindur av øðrum kvotum aftur við sum t.d. sild, makrel, gulllaks og hestamakrel.

Frá felagnum nótaskip ávaraðu vit tá nakað ímóti at leypa framav og mæltu heldur til at lata hesar íløgurnar koma frá tí pelagiska flotanum sjálvum tá ið hann var førur fyri at gera tær, tí annars komu vit at taka støði undan hesum flotanum, áðrenn hann rættuliga kom fyri seg og tað er júst tað, sum er um at henda nú.

2-3 hampulig ár innan hesi fiskasløg gjørdi tað møguligt hjá nøkrum av feløgunum at endurnýggja veiðutólið soleiðis, at eisini kundi farast undir svartkjaftavinnu. Men hvat hendir nú? Hesi skip eru illa nokk komin í gongd fyrrenn tað fer at ljóða, at tá ið TAC verður sett á svartkjaftin, ja, so verður so gott sum einki til henda flotan, sums íðst í 70´unum legði lunnar undir svartkjaftafiskiskapin og síðani hevur fiskað hann í stórum nøgdum.

Sum eg skilji eru eigarnir av einum av teimum nýggjastu svartkjaftaskipunum farnir at ganga aðrar leiðir ásannandi at við verandi útlitum er teimum nýggjaru skipunum ikki lív lagað.

Í einari grein í Dimmalætting herfyri vísti eg á, at meðalinntøkan hjá kraftblokkabátunum frá 1998 til 1999 varð fallin frá uml. 34 mió. kr. til uml. 19. mió. kr. og at nýggju skipini, sum eru komin inn nú mugu hava inntøkur fyri 35-40 mió. kr. við verandi oljuprísum og hækkandi rentu.

Hóast eg í tí greinini ikki nevndi eitt orð hvørki um trolarnar í Barentshavinum ella studning úr landskassanum, so kundi ein útvarpsmaður sama kvøldið fáa landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jørgin Niclasen, til at siga, at hann ikki fór at kappa høvdið av barentshavsflotanum og at kraftblokkabátarnir ikki skuldu turka nakað av upp á landskassan.

Eg havi sum sagt biðið um hvørki av hesum. Men vit sum hava við skip og fiskivinnu at gera, vit vita, at tað gongur upp og tað gongur niður. Tað mugu vit liva við í pelagisku vinnuni og tað mugu trolarnir í Barentshavinum eisini liva við eins og allir aðrar bólkar í fiskivinnuni. Bert tí at eitt ár er nakað vánaligari enn tað undanfarna, ber ikki til at leika í um at skula hava kvotur frá øðrum.

Tað sum vit í pelagisku vinnuni biða okkara fiskivinnumyndugleikar um er sum sagt ikki studning úr landskassanum, men vit biða teir hugsa um verandi flota áðrenn teir lata fleiri koma afturat við tí úrsliti, at eingin kann liva av hesum. Vit biða um at lata verandi flota fáa fótin fyri seg og so at hyggja upp á møguleikarnar fyri at leggja afturat. Væntandi fer pelagiski flotin at missa av øðrum fiskasløgum við minkandi TAC sum t.d. sild.

Vit sum í seinastuni hava flutt skip inn, kunnu undrast eitt sindur á, hvussu lætt ið tað hevur verið at fingið innflutningsloyvi. Í okkara tilsøgn um loyvi frá fiskimálastýrinum stendur, at »umsøkjarnir mugu prógva eitt rakstrargrundarlag, sum kann veita trygd fyri, um lanin er burðardygg«.

Vit sum eru í vinnuni hava meira og meira tungt við at fáa eina ætlan til at hanga saman og kunnu tí undrast yvir, hvussu lætt tað er at fáa loyvi til at flyta gomul skip inn - eftir tí vit vita - til nógv smærri kvotur og ein sterkt minkandi svartkjaftafiskiskap.

Sambært fiskifrøðingar var 1998 eitt heilt serligt ár til svartkjaft. Har var so nógv til, at tað »fleyt yvir« og tí var fiskur at fáa mestsum alt árið rundan um Føroyar og millum Føroyar og Ísland. 1999 vart heilt øðrvísi. Lítið var at fáa aftaná ta vanligu sesongina, sum er frá februar til miðjan mai.

Norðmenn hava við framkomnum verksmiðjutrolarum roynt at fingið nakað til matna (flak og fars) burtur úr svartkjaftinum, men niðurstøðan er, at hann er ov smáur til at hetta kann bera til. Tí eru allir norskir svartkjaftabátar - eisini verksmiðjubátarnir - gingnir yvir til at fiska alla svartkjaftakvotuna til ídna.

Á fundi síðst í farna ári spurdi eg formannin í Felagnum Íðnaðarskip, hví teir ikki keyptu onnur skip og fóru at fiska tað stóru kvotuna, sum liggur fyri einki m.a. í Norðsjónum. Svarið var stutt og greitt, at tað bar ikki til at fáa raksturin at hanga saman og vit kundu keypa kvoturnar hjá teimum bíliga.

Vit vita eisini, at norki íðnaðarflotin í fjør hevði eitt katastrofuár og at har ongar íløgur verða gjørdar í henda fiskiskap. Og sama skilið í Danmark. Hesar kvotur eru nú vorðnar »pappírskvotur«, sum vit bert gjalda fyri og ikki fiska og áttu tær tí at verið umsettar til veruligar kvotur.

Fyri at koma aftur til svartkjaftin og tað, at onkur vil kanna flotanum í Barentshavinum hann, so haldi eg tað fyri tað fyrsta vera órímiligt, at ein floti skal hava tvinnanda kvotur at dúva upp á. Fyri tað næsta er mín hugsan um hetta, at svartkjafturin undir Føroyum er brúktur til at handla í Barentshavinum við, meðan vit hava bygt okkum ein meira nútímans flota til sjálvir betri at kunna fiska hann. Tá ið flotin nú er um at vera her, so ber ikki til bara at sópa henda partin av tilverugrundarlagnum undan honum.

Søguliga er heldur einki grundarlag fyri at knýta svartkjaft við Føroyar og tosk í Barentshavinum saman. Upprunaliga høvdu hesi bæði fiskasløg einki við hvønn annan at gera.

Og tá ið tosað verður um, hvør ið hevur skaffa okkum nøkur søgulig rættindir, ja, so er tað sjálvandi rætt at russiski flotin undir Føroyum hevur verið við til hetta, men man tykist at gloyma tær mió. av tonsum, sum føroyskir nóta- og svartkjaftabátar sjálvir hava ført til lands í tí tíðarskeiðinum, sum ætlað er at brúka sum grundarlag - nevniliga frá 1977-1997. Tað fer helst at vera meira enn russarnir hava veitt í sama tíðarskeiði.



**Gøtu á trettanda 2000**
**Atli Hansen, form. í Felagnum Nótaskip**


Val av UMBOÐSRÁÐI
fyri S/F Tryggingarfelagið Føroyar

**Í februar mánaði ár 2000 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Tryggingarfelagið Føroyar. Valið er galdandi í fýra ár.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2000.

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum.

**Allir felagsins tryggingartakarar eru limir í felagnum.**

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt sínámillum tryggingarfelag, ið teknar øll sløg av skaðatryggingum. Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi. Umboðsráðið velur nevnd felagsins. Afturat hesum velja starvsfólkini í felagnum nevndarlimir sambært ta til eina og hvørja tíð verandi lóg um tryggingarvirksemi.

Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavist 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni og øllum avgreiðslunum.

**Tórshavn, tann 4. januar 2000**

**S/F Tryggingarfelagið Føroyar**
**Stjórnin**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 345600
Fax+298 345601
www.trygging.fo
tf@trygging.fo

SANSIR · TEL 355 355